# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Kári Svensson, listamaður:

## Ferðaframsýning og móttøka í Listaskálanum

**Fríggjadagin 30. januar var lat Kári Svensson upp ein ferðaframsýning í Listaskálanum í Havn. Eisini var móttøka í sambandi við at listamaðurin hevði fylt 50 ár**

Listaframsýningin “Hugbirtingar” hjá Kára Svensson lat upp seinasta fríggjadagin kl. 16. Jákup Simonsen frá mentamáladeildini hjá Tórshavnar Býráð lat framsýningina upp, og dupultkvartettin í Ebenezer sang nakrar sangir.

Á framsýningini vóru yvir 30 málningar og 6 standmyndir, sum listamaðurin hevur gjørt.

Framsýningin er opin til 22. februar, tá hon verður pakkað niður og flutt til Randers Kunstmuseum. Framsýningin verður eisini í øðrum Norðurlondum

Umleið 250 fólk møttu til móttøkuna hendan dagin.



*Í Listaskálanum var bæði framsýning og móttøka. Her er Kári Svensson saman við dóttrini, Beintu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Kristina á Váli, Amariel Norðoy, listamaður og konan, Marianna, sum hevur Galleri Focus*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jógvan Norðbúð heilsar uppá listamannin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Eliesar Arge, lækni og fyrrverandi løgtings- og býráðslimur, og Gunnar Hoydal, fyrrverandi býararkitektur, við eina av standmyndunum hjá Kára*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Ólavur á Váli og Suni Jacobsen, sum báðir fáast við málningalist, og Jákup Simonsen, sum lat framsýningina upp*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# UTTAN ÚR HEIMI

## Royna hópoyðingarvápn við politiskum fangum

**BBC vil í einari nýggjari sending vera við, at myndugleikarnir í Norðurkorea nýta politiskar fangar sum royndardjór, tá ymisk hópoyðingarvápn skulu roynast**

VÁPNAROYNDIR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í sendingini Access to evil (Atgongd til óndskap) vísir BBC á eitt alment norðurkoreanskt skjal, har sagt verður, at politiskir fangar verða nýttir sum royndardjór, tá ymisk evnafrøðilig vápn skulu roynast. BBC veit eisini at siga, at norðurkoreanar hava nýtt kvinnur og børn í slíkum royndum.

Sambært BBC stava upplýsingarnar frá einum fyrrverandi norðurkoreanskum hernaðarsendimanni í Beijing. Sendimaðurin lýsir eitt sokallað gasskamar, og hann vil vera við, at hann hevur sjálvur sæð gasskamarið og fólk, sum vórðu nýtt í royndunum har.

– Eg var hjástaddur, tá eitt húski bleiv nýtt í einari kanning við gassi. Øll doyðu, foreldrini, ein drongur og ein genta. Foreldrini spýðu, men kortini royndu tey at bjarga børnunum við at blása luft í munn teirra, hevur hernaðarsendimaðurin greitt frá. Sambært BBC hava trý onnur fólk váttað upplýsingarnar.

Spurdur, mhvussu tað kendist at síggja børnini doyggja, svarar sendimaðurin, at hann hevði ikki samkenslu við teimum.

– Undir tí stýrinum, sum eg tá hevði, hevði eg bara kensluna av, at hetta var fíggindin, sigur hann við BBC.

Altjóða mannarættindafelagsskapurin Amnesty International sigur seg ikki hava prógv fyri, at norðurkoreanar nýta fangar til vápnaroyndir. Ein talskvinna hjá felagsskapinum sigur við Reuters, at tey hava hoyrt um hetta, men at norðurkoreansku myndugleikarnir hava víst skuldsetingunum aftur.



## Í ringum sjógvi

*Tað er ikki bara á okkara leiðum, at sjógvurin kann vera ringur. Hendan myndin er tikin umborð á avstralska sjóverjuskipinum »Warramunga«, sum jagstrar veiðitjóvar í Indiska Havinum.*

## Bush hóttir heimsbúskapin

**Amerikanski forsetin er ein størri hóttan ímóti heimsbúskapinum enn heimsfriðinum, sigur landsmaður hansara Joseph Stiglitz, sum fekk Nobelheiðurslønina í búskapi í 2001**

BÚSKAPUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í samrøðu við týska blaðið Frankfurter Rundschau leggur Joseph Stiglitz stjórnina hjá Bush forseta undir ábyrgdarloysi.

– Tá stjórnin kom framat, svaraði avlopið á landsins fíggjarlóg til tvey prosent av bruttotjóðarframleiðsluni, men í dag hevur fíggjarlógin eitt hall, sum er fimm prosent av framleiðsluni. Tað er ábyrgdarloysi, sigur tann viðurkendi búskaparfrøðingurin, sum fekk Nobelheiðurslønina í 2001.

Hann vísir á, at eit er, at USA hevur 477 milliardir dollarar í halli á fíggjarlógini í ár, men harafturat kemur, at landið hevur ovurstórt hall á handilsjavnanum. Og hetta viðkemur ikki bara amerikanarunum, sigur Joseph Stiglitz, sum vísir á, at politikkurin hjá Bush-stjórnini hevur styrlt evruna og gjørt dollaran veikari við tí úrsliti, at ES-londini fáa trupulleikar við útflutninginum.

– Bush er ein hóttan fyri heimsbúskapin, men tað leggur hann einki í. Hann setir áhugamálini hjá amerikanarunum oman fyri alt annað og letur hin partin av heiminum sigla sín egna sjógv, sigur Joseph Stiglitz við Frankfurter Rundschau.

### Bussvanlukka onga ávirkan

Vanlukkan við einum donskum bussi í Týsklandi fyri nøkrum døgum síðani, sum kravdi trý mannalív, hevur eftir øllum at døma ikki stóra ávirkan á danskar bussførarar.

Um vikuskiftið kannaði løgreglan ferðina hjá 107 bussum, sum koyrdu um markið ímillum Danmark og Týskland, og tá liðugt var, hevði løgreglan staðfest 78 brot á ferðslulógina. Talan var tó ikki bara um ov nógva ferð, tí í fleiri førum staðfesti løgreglan brek við bussunum.

Ovastin hjá løgreglumonnunum, sum gjørdu kanningarnar, sigur við JydskeVestkysten, at kanningin vísir, at støðan við bussflutninginum er einki batnað aftan á vanlukkuna í Týsklandi. Formaðurin hjá busseigarunum sigur við blaðið, at sjálvandi eigur alt at vera í lagi við bussunum, og hann harmast tær nógvu frágreiðingarnar, sum løgreglan skrivaði á markinum um vikuskiftið.

### Lærarar eru ótryggir

Ein kanning í Noregi vísir, at umleið 20 prosent av lærarunum í framhaldsdeildini kenna seg ótryggar, tá teir skulu meta um fakliga førleikan hjá næmingunum. Soleiðis er eisini, tá teir skulu taka støðu til, hvussu undirvísingin skal skipast.

Elaine Murthe, sum hevur gjørt kanningina, sigur við Bergens Tidende, at í skúlaskipanini verður tað tikið sum givið, at lærararnir kenna seg tryggar í øllum skúlans viðurskiftum, men at í veruleikanum noyðast lærararnir ofta at taka avgerðir, uttan at teir fáa stundir til at hugsa seg um fyrst. Sambært kanningini hava nógvir lærarar ilt við at meta um førleikastøðið hjá tí einstaka næminginum og at laða undirvísingina eftir tí.

Kanningin vísir eisini, at tað eru serliga teir yngstu og teir elstu lærararnir, sum kenna seg ótryggar, og tað heldur Elaine Murthe geva eina ábending um, hví nógvir norskir lærarar velja at fara frá við eftirløn rættiliga tíðliga. Lærarar, sum eru ímillum 40 og 50 ár, kenna seg harafturímóti tryggari, sigur hon.

### Færri roykja

Færri og færri fransmenn festa sær í, og nú vísir ein kanning, at fronsku roykjararnir eru tvær milliónir færri í tali nú enn fyri fimm árum síðani.

Kanningin vísir kortini, at tað er ikki júst størri umsorgan fyri heilsuni, sum ger, at færri fransmenn roykja. Í fjør hækkaði prísurin á sigarettum, soleiðis at ein pakki við 20 sigarettum kostar nú umleið 40 krónur, og tað fekk umleið 14 prosent av teimum fronsku roykjarunum til at legja av. Í dag roykja 30,4 prosent av øllum fransmonnum ímillum 15 og 75 ár, og tað svarar til, at 13,5 milliónir fransmenn roykja. Fyri fimm árum síðani royktu 34,5 prosent av teimum ímillum 15 og 75 ár.

Franska kanningin vísir, at tað eru serliga tey yngru og kvinnurnar, sum hava lættari við at leggja av at roykja, ella sum ongantíð festa sær í. Í hesum bólkunum er talið á roykjarum minkað 18 prosent tey seinastu fimm árini.

### Spældi lækni

Ein 33 ára gamal norðmaður, sum lesir til lækna, hevur arbeitt á einum svenskum sjúkrahúsi, har fólk hildu, at hann var liðugur við sína útbúgving.

Tann læknalesandi hevur viðgjørt fleiri hundrað sjúklingar hesi bæði árini. Hann hevur staðfest diagnosur og skrivað reseptir, sjálvt um hann í veruleikanum ikki hevði loyvi til tess, uttan at ein útbúgvin lækni var saman við honum. Men eingin lækni fylgdi við arbeiði hansara, tí hinir læknarnir og leiðslan á sjúkrahúsinum vistu ikki betur, enn at maðurin hevði lokið sína útbúgving.

Tann 33 ára gamli norðmaðurin hevur lisið til lækna á tveimum lærdum háskúlum í Pólandi, men hann hevur ongantíð gjørt seg lidnan við útbúgvingina. Sjálvur sigur hann, at polska læknaútbúgvingin er betri enn útbúgvingin í Noegi og Svøríki, og at hann tí heldur seg hava betri førleika enn norskir og svenskir læknar, sjálvt um hann ikki er liðugur við útbúgvingina.